


Frá útbjóðingini í 2012

# Bretar bjóða nýggj øki út til oljuleiting

**Jan Müller**

26.01.2014 - 12:04

Oljan.fo

**Bretski orkumálaráðharrin, Michael Fallon hevur latið upp fyri 28. útbjóðingini av økjum á bretska landgrunninum til framtíðar oljuleiting. Hetta hendi fríggjadagin og skilst, at rættiliga mong feløg, harímillum tey føroysku, ætla sær at bjóða.**

**Umframt Norsjógvin so verða eisini øki vestan fyri Hetland og tætt føroyska markinum bjóðað út.**

Feløg, sum arbeiða á bretska landgrunninum, veita umleið helvtina av allari orkuveitingini í Bretlandi og ætlar ráðharrin í orkumálum, at henda gongdin skal halda fram og vónar hann, at feløg fara at gera íløgur í nýggja leiting fyri at økja framleiðsluna í framtíðini. Ein stórur partur av hesi framleiðslu stavar frá leiðunum við føroyska markið og roknað verður eisini við, at øki nær markinum verða boðin út.

Oljumálaráðharrin heldur tað liggja goymdar 20 milliardir tunnur av olju í undirgrundini. *Í dag arbeiða meira enn 350.000 fólk í hesi vinnu, og í fjør gjørdu oljufeløgini íløgur uppá 150 milliardir kr.*

Stórur áhugi er fyri at leita eftir olju á bretska landgrunninum. Í dag arbeiða meira enn 50 oljufeløg í økinum. Nýggja útbjóðingin letur aftur 25. apríl, so feløgini hava úr at gera at gera umsónirnar lidnar.